**Bjørn Kalsø**
**Bárður Nielsen**
**Kaj Leo Holm Johannesen**
**Edmund Joensen**
**Magnus Rasmussen**
**Magni Laksáfoss**
**løgtingsmenn**

**Broytingaruppskot**
**til**
**3. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 18/2017: Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

§ 21 verður orðað soleiðis:
"**§ 21.** Rættindi sambært hesi løgtingslóg, tó undantikið rættindini sambært §§ 14-16, § 17, stk. 1 og stk. 2, § 18, stk. 1 og stk. 3, 1. pkt., §§ 58-61 og §§ 73 og 74, eru galdandi, til tey verða uppsøgd við 8 ára varningi."

**Viðmerkingar**
Rættindi eru galdandi, til tey verða uppsøgd við 8 ára varningi, tó undantikið rættindini sambært §§ 14-16, § 17, stk. 1 og stk. 2, § 18, stk. 1 og stk. 3, 1. pkt., §§ 58-61 og §§ 73 og 74.

Øll fiskirættindi eru, sum lógin ásetir, ogn Føroya fólks og kunnu tí ongantíð gerast privat ogn hjá persóni ella felagi. Tí verða fiskirættindini útlutað sum brúksrættindi, ið hava eina uppsagnartíð á 8 ár.

Tað merkir, at Løgtingið við lóg hevur fullan rætt at siga loyvini upp uttan endurgjald við 8 ára uppsagnarfreist.

Broytingin fer at gera tað tryggari hjá teimum, sum eru í vinnu, og teimum, sum ætla sær inn í vinnuna - bæði at gera íløgur og at virka í vinnuni.

**Á Løgtingi, 12. desember 2017**

Bjørn Kalsø | Bárður Nielsen | Edmund Joensen

Magnus Rasmussen | Magni Laksáfoss

Kaj Leo Holm Johannesen